LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 12. mai 2014

J.Nr.:11/ 201400050 / 12

**Álit**

viðvíkjandi klagu um partvíst innlit

Í teldubrævi, dagfest 12. februar 2014, hevur A, journalistur í Kringvarpi Føroya, sent umboðsmanninum eina klagu um vantandi innlit í eina frágreiðing frá einum fundi í Fíggjarmálaráðnum.

Klagarin hevur tann 20. og 28. november 2013 biðið um innlit í frágreiðing frá fundi/fundum millum løgmann, Fíggjarmálaráðið (FMR), Innlendismálaráðið (IMR) og formannin fyri Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin, D, sum var/vóru á heysti 2013 um fígging av Skálafjarðartunlinum.

Tann 3. desember 2014 fekk klagarin partvíst innlit í fundarfrágreiðingina. Upplýsingar um fundarstað, tíð og hvør luttók á fundinum vóru latnar, men klagarin fekk ikki innlit í innihaldið í fundarfrágreiðingini.

**Málsgongd**

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, hevur umboðsmaðurin valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum máli.

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og í skrivi, dagfest 27. februar 2014, varð klagan send Fíggjarmálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Fíggjarmálaráðið biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 31. mars 2014 sendi Fíggjarmálaráðið umboðsmanninum frágreiðingina um viðgerðina av málinum saman við skjølunum í málinum. Frágreiðingin var soljóðandi:

> "Frágreiðing viðvíkjandi mál nr. ...
>
> 3. desember 2013 fekk A soljóðandi svar til hennara umbøn um innlit:
>
> *"Fundarfrágreiðing, dagfest sunnudagin 25/8-2013*
> § 7, nr. l í Innlitslógini er soljóðandi:

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

"Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu"

Fundarfrágreiðingin, dagfest tann 25/8-2013, er einans ætlað til egna nýtslu hjá stjórnarráðnum. At útiloka hetta skjal frá rættinum til innlit sambært § 7, nr. 1 er at verja innanhýsis metingar hjá stjórnarráðnum í sambandi við fyrireiking av avgerðargrundarlagnum.

Víst kann í hesum sambandi verða til síðu 181, Betænkning nr. 857, 1978:

"Medens offentlighedskommissionen, som det fremgår af det ovenfor side 179 gengivne citat af kommissionsbetænkningen, ikke ville anse referater af udvalgs eller råds møder med udenforstående for omfattet af den til offentlighedslovens § 5, nr. 3, svarende bestemmelse i kommissionsudkastets § 4, stk. 2, synes det i såvel den juridiske litteratur som i praksis i relation til offentlighedsloven (og partsoffentligheden) fast antaget, at mødereferater af enhver art (der ikke er *afgivet* til udenforstående) er internt arbejdsmateriale (...)"

Ein heildarmeting av fundarfrágreiðingini vísir, at frágreiðingin fyrst og fremst er gjørd fyri at veita grundarlag fyri innanhýsis metingar. Fundarfrágreiðingin er sostatt ikki fevnd av § 8 í innlitslógini, ið veitir undantøk til ásetingarnar í § 7 í innlitslógini.

Tó verða veruligar umstøður fingnar til vega sambært § 11 í innlitslógini. Fundarfrágreiðingin sæst niðanfyri sum myndaravrit av PDF fílu." *(Er ikki endurgivin í hesum áliti, mín viðm.)*

Fundurin snúði seg um ítøkiliga áhugan hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin (AMEG) at gera íløgur í Eysturoyartunnilin. Skuldi AMEG fáa heimild at gera hesar íløgur, var neyðugt at broyta kunngerð um røkt av fæi hjá AMEG. Tílíkt ynski um broyting til tess at gera íløgur hevði verið viðgjørt og møguliga góðkent av Fíggjarmálaráðnum, ið varðar av málsøkinum. Tey sjónarmið og tær grundgevingar, ið vóru frammi á fundinum, høvdu verið tikin við í einari møguligari málsviðgerð hjá Fíggjarmálaráðnum.

Fundarfrágreiðingin finst bert í Fíggjarmálaráðnum og er ikki latin øðrum persónum ella myndugleikum. Fundarfrágreiðingin er einans ætlað til egna innanhýsis nýtslu hjá Fíggjarmálaráðnum og til at stuðla undir málsviðgerðina hjá ráðnum.

§ 11 heimilar at ávísar veruligar upplýsingar av stórum týdningi kunnu vera fyri innliti, meðan aðrir minni týðandi, men tó áhugaverdar upplýsingar ella orðingar ikki verða fyri innliti.

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at fundarfrágreiðingin inniheldur upplýsingar um veruligar umstøður av stórum týdningi fyri málið, ið skulu latast sambært §11, stk. 1."

Tann 9. apríl 2014 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**

Viðgerðin av hesi klagu snýr seg um avgerðina hjá Fíggjarmálaráðnum at nokta klagaranum innlit í frágreiðingina frá fundi millum Løgmansskrivstovuna, Innlendismálaráðið, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Fíggjarmálaráðið um Eysturoyartunnilin. Fíggjarmálaráðið gav klagaranum innlit í upplýsingar um fundarstað, nær fundin hevði verið og hvør luttók á fundinum, men ikki í sjálva frágreiðingina.

Rætturin til innlit fevnir sum útgangsstøði um øll skjøl, sum myndugleikin hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð.

Sambært § 7 í innlitslógini (Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) eru innanhýsis skjøl ikki fevnd av rættinum til innlit.

§ 7, nr. 1 í innlitslógini er soljóðandi:

> "**§7.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru
> 1) skjøl sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu
> ..."

Sambært viðmerkingunum til § 7 er ásetingin ætlað at verja innanhýsis avgerðargongdina hjá myndugleikanum.

Fundarfrágreiðingar millum eitt aðalráð og onnur, ið ikki eru partur av aðalráðnum, eru sambært omanfyri nevndu viðmerkingum at meta sum innanhýsis arbeiðsskjøl, um hesi eru gjørd til egnu nýtslu myndugleikans. Fíggjarmálaráðið hevur í frágreiðingini til mín víst á, at fundarfrágreiðingin bert finst í Fíggjarmálaráðnum, og at hon ikki er latin øðrum persónum ella myndugleika.

Eftir at hava gjøgnumgingið fundarfrágreiðingina eri eg av tí fatan, at talan er um eina frágreiðing, sum einsíðugt lýsir samskifti og meiningar millum fundarluttakarnar, og sum er gjørd til egna nýtslu hjá Fíggjarmálaráðnum. Eg havi tí ikki orsøk til at finnast at avgerðini hjá Fíggjarmálaráðnum um at nokta klagaranum innlit vísandi til § 7, nr. 1 í innlitslógini.

Tá ið eitt skjal er fevnt av undantakinum til skjalainnlit sambært § 7 í innlitslógini, skal myndugleikin meta um, um tað eru ítøkiligar upplýsingar í skjalinum, ið skulu latast sambært § 11, stk. 1 í innlitslógini, ið er soljóðandi:

> "**§ 11.** Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar."

Eftir at hava gjøgnumgingið fundarfrágreiðingina kann eg staðfesta, at hon ikki inniheldur upplýsingar um veruligar umstøður, sum er av stórum týdningi fyri málið, sum innlit sambært § 11 stk. 1 eigur at verða latið í. Eg havi tí heldur ikki orsøk at finnast at metingini av hesum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Burtursæð frá omanfyri standandi viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður